Álit

í

løgtingsmáli nr. 9/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Árlig javning av landsskattastiganum)

Árni Skaale, Beinir Johannesen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Jacob Vestergaard og Jørgen Niclasen, tingmenn, hava lagt málið fram 28. august 2025, og eftir 1. viðgerð 11. september 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 16. september 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Dennis Holm og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at javna skattastigan árliga við teirri grundgeving, at verður stigin ikki javnaður, førir lønarvøksturin í samfelagnum við sær, at løntakarin so líðandi rindar meira í skatti, og at skattatrýstið sostatt veksur av sær sjálvum.

Tí er skotið upp at javna skattastigan á hvørjum ári við prosentvísa vøkstrinum í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðinum, sum endaði 1. oktobur í árinum fyri.

Meirilutin tekur undir við at javna skattastigan. Undir hoyringunum er upplýst, at landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur gjørt eitt líknandi, men meira umfatandi uppskot, ið hevur verið í almennari hoyring, og sum fer at verða lagt fyri Løgtingið í næstum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Rósa Tyril Gaardlykke) hevur hesar viðmerkingar:

Seinastu árini hevur føroyski búskapurin havt stóra framgongd. Hetta hevur havt sína ávirkan, tí vit hava samstundis havt stóran lønar- og prísvøkstur í Føroyum. Serliga hevur prísvøksturin tey seinastu árini gjørt fíggjarstøðuna hjá mongum ringa.

Landsskattastigin hevur tó mestsum verið óbroyttur síðani 2016. Tað hevur merkt, at størri partur av lønini so líðandi er lyftur upp á hægri skattastig, og at borgarar tí eru vorðnir skattaðir alsamt harðari.

Við uppskotinum verða á hvørjum ári mørkini í landsskattastiganum fyri komandi ár við løgtingslóg javnaði við prosentvísa vøkstrinum í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðinum, sum endaði 1. oktobur í árinum fyri. Roknaðu mørkini verða rundað upp til nærmastu kr. 1.000 fyri at halda skattastigan einfaldan.

Landsstýrisfólkið leggur fram uppskot til løgtingslóg um javning av skattastiganum fyri 8. mars á hvørjum ári, fyrstu ferð í 2026. Uppskotið um javning skal sostatt leggjast fram tíðliga á árinum, og hevur hetta til endamáls, at løntakarar í góðari tíð frammanundan kenna skattligu fortreytirnar fyri komandi árið. Skipanin fær virknað fyri skattaárið 2027 og frameftir.

Henda skipan fer at byrgja fyri, at skattatrýstið fer at vaksa av sær sjálvum, eins og undanfarnu árini, har politiska skipanin hevur latið staðið til heldur enn at tillaga skattastigan samsvarandi lønarvøkstrinum. Tískil er ein tílík skipan neyðug.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Rósa Tyril Gaardlykke	